

www.oljan.fo

**Jan Müller** 21 - 04 - 2012

# Greenpeace hjálpir oljufelag

Umhvørvisverndarfelagsskapurin Greenpeace gjørdi nógv burtur úr, tá Cairn Energy fór undir oljuboringar í Grønlandi. Greenpeace er harðliga ímóti at borað verður eftir olju í arktiska økinum og fór tí undir eitt átak, sum skuldi varpa ljós á sjónarmiðini hjá Greenpeace viðvíkjandi boring har. Nú skrivar grønlendska Sermitsiaq, at átakið hjá Greenpeace mótvegis Cairn Energy møguliga kemur at tæna virkseminum hjá oljufelagnum. Hetta tí at umrøðan, sum Greenpeace fekk, í síðsta enda virkaði til, at ljós varð varpað á hvussu skjótt og virkið Cairn Energy arbeiddi í samband við boringarnar. Og henda umrøðan kann verða gull verd, tá oljufelagið næstu ferð skal samráðast skrivar blaðið.